**UTTAN ÚR HEIMI**

## Ódnarveður í Norðurnoregi

Tað hevur verið av ringasta veðri í pørtum av Norðurnoregi í gjár og í dag. Nógv hús hava fingið skaða, og umleið 50 bilar fingu skaða av leysum smágróti, sum feyk í vindinum. Fólkaskaði var tó eingin. Í Hammerfest stóðu bussarnir stillir, og foreldrini fingu boð um at koma í skúlan eftir børnunum. Flogferðslan lá eisini still.

Norsku veðurmenninir siga, at veðrið verður uppaftur verri í morgin. Teir vænta einar 45 metrar um sekundið í hvirlunum. Tað fer at elva til húsaskaðar, bátar slíta og fara á land, og samferðslan verður nógv darvað.

Veðurmenninir hava eisini ávarað um vandan við ísi. Hann verður landssynningur í ættini, og um veturin er tann ættin sum oftast køld. Tí vænta veðurmenninir eini 25 kuldastig inni í landinum og umleið 10 kuldastig fram við sjónum. Tí hevur tilbúgvingin biðið bátaeigarar binda bátarnar betur, skrivar Aftenposten.

## Vístu mynd av gísla

Arabiska sjónvarpið Al-Jazeera vísti í gjárkvøldið myndir av amerikonsku tíðindakvinnuni Jill Carroll, sum hvarv í Bagdad tann 7. januar. Saman við myndunum var eitt bræv frá burturflytarunum, sum krevja, at allar kvinnur, sum sita fangar í Irak, skulu latast leysar. Ger USA ikki sítt til, at kravið verður eftirlíkað, verður Jill Carroll tikin av døgum, stóð í brævinum.

– Tann 28 ára gamla tíðindakvinnan hevur arbeitt sum sjálvstøðug, men var farin til Irak at skriva fyri The Christian Science Monitor. Tann 7. januar varð hon burturflutt í einum býarparti í Bagdad. Ein irakskur tíðindamaður, sum varð saman við henni, bleiv eisini burturfluttur, og hann varð seinni funnin myrdur.

– Síðani hevur eingin frætt nakað frá Jill Carroll fyrr enn nú, men Al-Jazeera vil ikki siga, hvør gav støðini myndirnar og brævið.

## Vilja ikki vita av Arnold

Tingið í meksikanska landspartinum Baja California boðaði í gjár frá, at guvernørurin í tí amerikanska Kalifornia, Arnold Schwarzenegger, er ikki vælkomin suður um markið, tí hann hevur tosað niðurlátandi um meksikanskar innflytarar.

– Terminator tykist hava gloymt, at hann kom eisini til USA sum innflytari, og nú styðjar hann eina racistiska hugsjón, sum er vend ímóti innflytarum, sum fara til Kalifornia at søkja sær arbeiði, sigur ein av tinglimunum, Arturo Pena Valle, við AP.

Herfyri havnaði Schwarzenegger einum uppskoti um at geva innflytarum, sum ikki hava uppihaldsloyvi í Kalifornia, eitt fyribilskoyrikort.

## Vápnahvíld í klønum tráð

Hóast bæði stjórnin og teir tamilsku loysingarmenninir í Sri Lanka taka undir við at leingja vápnahvíldina, eru samanbrestir at kalla hvønn dag. Í gjár doyðu tvey sivilfólk og ein hermaður, tá ein bumba brast tætt við ein hermannabuss, og myndugleikarnir ivast ikki í, at tað vóru tamilskir uppreistrarmenn, sum løgdu bumbuna.

Tað eru skjótt fýra ár, síðani partarnir samdust um at binda frið, men vápnahvíldin hevur víst seg at vera svikalig. Tað vóru norskir semingsmenn, sum fingu vápnahvíldina í lag, og teir royna nú at fáa partarnar aftur til samráðingarborðið fyri at fáa enda á samanbrestunum. Í gjár hittu norsku umboðini politiska leiðaran hjá tamilunum, og í næstu viku fer Erik Solheim, menningarmálaráðharri, til Sri Lanka at tosa við partarnar. Hann hevur fyrr verið semingsmaður har.

Teir tamilsku loysingarmenninir hava stríðst fyri egnum ríki síðani 1983, og meiri enn 65.000 fólk hava latið lív í bardøgum ímillum loysingarmenninar og stjórnarherin hesi árini.

# Skjótur deyðadómur

**Bara 14 dagar eftir at teir myrdu eina bretska kvinnu, eru tveir teilendskir fiskimenn dømdir til deyða fyri morðið.**

**TEILAND**
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*



*23 ára gamli Bualoi Posit og 24 ára gamli Wichai Somkhaoyai eru dømdir til deyða fyri at hava neyðtikið og myrt Katherine Horton*

Fyri tíggju døgum síðani tók teilendska løgreglan tveir ungar fiskimenn og skuldsetti teir fyri at hava beint fyri bretsku kvinnuni Katherine Horton sjálvan nýggjársdag.

Kanningar vístu, at tann 21 ára gamla kvinnan var vorðin neyðtikin og síðani myrd, og teir báðir menninir viðgingu, at tað vóru teir, sum høvdu framt brotsverkið. Í gjár vórðu teir dømdir til deyða.

Tað hevur vakt ans, at teilendsku myndugleikarnir hava borið so skjótt at í hesum málinum, og summi vilja vera við, at myndugleikarnir royna at vísa, hvat hendir teimum, sum gera seg inn á fremmand ferðafólk. Ferðavinnan hevur alstóran týdning fyri teilendska búskapin, og dagarnar eftir morðið vildu fjølmiðlar vera við, at slíkir tilburðir kunnu fáa ferðafólk at fara aðrastaðni.

Teilendski forsetin, Thaksin Shinawatra, kravdi beinanvegin, at teir báðir menninir skuldu dømast til deyða, men mamma Katherine Horton bað rættin døma teir lívlangt fongsul.

Katherine Horton varð jarðað í heimbygdini uttan fyri Cardiff í Wales fyrradagin.

# Beyð sær til at finna Osama bin Laden

**Mehmet Ali Agca, sum royndi at beina fyri Jóhannesi Páll páva, var til reiðar at finna bin Laden, um hann slapp leysur afturfyri**

**YVIRGANGUR**
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



*Fyri fimm árum síðani var Mehmet Ali Agca til reiðar at finna Osama bin Laden*

Í síðstu viku varð Mehmet Ali Agca latin leysur, eftir at hann hevði sitið 25 ár í fongsli fyri at hava roynt at myrða fyrrverandi pávan Jóhannes Páll Annan á Pæturstorginum í Rom í 1981.

Nú avdúkar turkiska blaðið Hurriyet, at Mehmet Ali Agca beyð sær til at finna yvirgangsleiðaran Osama bin Laden fyri góðum fimm árum síðani, um hann kundi sleppa úr fongslinum afturfyri. Í einum hondskrivaðum brævi til turkisku fregnartænastuna, sum er dagfest tann 1. september í 2000, sigur Ali Agca seg vera sinnaðan at fara til Afghanistan og at koma sær upp í yvirgangsfelagsskapin al-Qaeda, so hann kann fáa fatur á bin Laden.

– Eg eri til reiðar at átaka mær hesa søguligu uppgávuna, sjálvt um tað skal kosta mær lívið. Kann eg gerast hetja í USA, hevði tað tænt turkiska fólkinum og Turkalandi, skrivar hann í brævinum. Við hesum seinasta sipar hann til, at nógvir turkar vóru í øðini inn á hann, tá hann royndi at beina fyri pávanum, tí teir hildu hann hava vanærað turkar og Turkaland.

Hurriyet vil ikki siga, hvussu tað hevur fingið fatur á brævinum hjá Mehmet Ali Agca.

USA hevur lovað 25 milliónir dollarar í finningarløn, verður bin Laden funnin, men enn hevur eingin avdúkað, hvar hann fjalir seg.

# Ætlaði Bush at bumba Al-Jazeera?

Arabiska sjónvarpsstøðin Al-Jazeera vil vera við, at George W. Bush, forseti, og Tony Blair, forsætisráðharri, umrøddu eitt uppskot um at bumba støðina, tá teir báðir hittust í Hvítu Húsunum í apríl í 2004. Al-Jazeera sigur, at tað var Bush, sum kom við hugskotinum, men at Blair sýtti fyri at taka undir við tí. Hetta sama skrivaði bretska blaðið Daily Mirror fyri tveimum mánaðum síðani.

Bretska stjórnin sigur, at einki hald í í tí, sum sjónvarpsstøðin sigur, men leiðslan í Al-Jazeera hevur sett fleiri kendar løgfrøðingar at taka sær av málinum. Teir skulu royna at fáa fatur á einari útskrift av tí, sum varð sagt á fundinum millum Bush og Blair.

– Vit vilja bara hava fatur á teimum tíggju reglunum, sum snúgva seg um hugskotið hjá Bush at bumba høvuðsstøð okkara í Qatar. Hitt hevur ongan áhuga, sigur leiðslan í Al-Jazeera.